Poul Michelsen:

# Framferðarhátturin er munurin



Poul Michelsen avvísir púrasta, at stríð skal vera innanhýsis í Fólkaflokkinum. Talan er um ymsar meiningar, men um eitt flokk, ið stendur saman, sigur hann.

Mynd: Jens Kristian Vang

**– Tað er einki stríð í Fólkaflokkinum. Vit eru ikki heilt samdur um mátan, ið vit røkka fullveldi, men vit standa saman, sigur Poul Michelsen**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

**Tórshavn:** Tað hevur ligið á ljóði, at stríð skal vera íkomið í Fólkaflokkinum. Tað gamla søgan um stríð millum ein fullveldis- og ein sambandsvong í flokkinum er farin at spøkja aftur. Ein teirra, ið legði alstóran dent á fullveldi í valstríðnum, var fyrrverandi borgarstjórin í Havn, Poul Michelsen. Vit slagorðum um at tryggja fullveldistilgongdina fór hann til val. Úrslitið gjørdist, at hann varð varamaður á tingi fyri teir báðar Bjarna Djurholm og Òla Breckmann, og hann slap eisini á ting mikumorgunin, tí Bjarni Djurholm jú er landsstýrismaður. Poul Michelsen er tó ikki fremmandur fyri tingarbeiðinum, tí hann sat á tingi árini 1984 til 1990.

– Eg var kanska ikki so veldiga imponeraður. Tú kemur eisini rættiliga skjótt inn í umhvørvið, sigur Poul Michelsen, sum saman við Jákup Mikkelsen og Jóanis Nielsen tók sæti á tingi mikumorgunin sum varamenn, og teir atkvøddu allir fyri Hergeir Nielsen. Poul Michelsen sigur, at tað var eingin avtala gjørd um, hvønn fólkaflokstingmenninir skuldu velja fyri uttan teirra egna uppskot, Óla Breckmann. Eisini sigur Poul seg hava merkt, at tingmenn tóktust at vera troyttir, eftir nógvar og strævnar dagar við tingingum.

Sjálvur atkvøddi Poul fyri Hergeir Nielsen á tingfundinum.

– Hetta gjørdi eg, tí eg vildi vísa hvønn veg, ið eg gjarna vil fara, sigur Poul Michelsen.

Hann avvísir, at tað skal vera íkomið stríð í Fólkaflokkinum millum teir báðar vongirnar.

– Munur er mátin, ið tú ynskir at røkka fullveldinum. Tað er einki stríð í Fólkaflokkinum. Vit standa saman um stevnuskránna. Ymsu meiningarnar eru bara meira sjónligar alment í Fólkaflokkinum enn aðrastaðni, sigur Poul Michelsen.

Hann leggur afturat, at felagsstevið hevur ongantíð verið nakað, ið hevur eyðkent flokkin.

Poul Michelsen sigur, at støðan á politiska pallinum er rættiliga trupul í løtuni, og tað krevur eitt sindur fyri at fáa kabalina at ganga upp.

**Forsvarligt**

Fullveldi, ið Poul Michelsen serliga tosaði um í valstríðnum, var eisini orsøkin til, at Poul Michelsen valdi at fara aftur inn í politikk. Hann heldur eisini, at fullveldistilgongdin stóð seg væl á valinum, meðan Sambandsflokkurin ikki stóð so væl, sum tað oftani verður útlagt, at hann gjørdi.

– Eg leggi stóran dent á fullveldi. Tað skal ganga forsvarligt fyri seg, men tað skal vera ein ógvuliga tilvitað gongd móti fullveldinum. Tað nyttar einki, at vit einans tosa um fullveldi á flagdegnum og við hátíðarhald og annað, sigur Poul Michelsen, sum sigur seg krevja handling,

So leingi Bjarni Djurholm verður sitandi í landsstýrissessinum, eigur Poul Michelsen sæti á tingi.

# Ungur fíólmeistari vann kapping



TÓNLEIKUR
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Ein vakurt tilevnaður trækassi, fýra streingir, ein bogi og ein musikalskur heili skal til, um tú skal gerast kendur fiónleikari og 11 ára gamla Heiðrun Petersen hevur hesar eginleikar. Hon er nevniliga ein dugnaligur fiónspælari og hon er í dag stoltleikin hjá Musikkskúlanum.

9.-12. mai var hon í Vejle og luttók í eini kapping, íð nevnist Jacob Gade kappingin. Hon kappaðist við 64 aðrar fiólleikarar og vann kappingina. Virðislønin var 900 krónur, kanska ikki so nógvur peningur, men heiðurin hjá Heiðrun er stórur.

Lærarin hjá Heiðrun er Sámal Petersen og undir kappingini spældi Stamen Stantchev flygel.

ítróttur

Nr. 93 • leygardagur • 18. mai 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Christian Høgni aftur í NSÍ

*Danska superligan er nú liðug á hesum sinni, men hóast niðurflytingin varð veruleiki hjá Vejle, tykist hetta á ongan hug at hava tikið hugin hjá Christian Høgna til fótbóltin burtur*



**Landsliðsleikarin kemur aftur til Føroya leygardagin, og verður ætlandi við, tá NSÍ annan hvítusunnudag spælir í Vági**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Sum nevnt aðra staðni á hesum síðum, so er kappingin í donsku superliguni av á hesum sinni, og eitt av úrslitunum gjørdist, at Vejle komandi árið skal spæla fótbólt í næstfremstu donsku røðini.

Hetta tykist tó á ongan hátt at hava tikið hugin frá føroyska leikaranum í Vejle. Beint, sum niðurflytingin var veruleiki, tóku telefonlinjurnar millum NSÍ og Vejle at hitna. Tingast hevur verið aftur og fram, og endin gjørdist, at Christian Høgni fer at spæla við barndómsfelagnum hetta fram til summarsteðgin.

**Við mánadagin**

Tað er leiðslubólkurin í NSÍ, sum hevur havt sambandið við bæði Vejle og Christian Høgna, og sum vera man, so er frøin stór um, at tað soleiðis hevur eydnast at styrkja um álopspartin av liðnum.

- Tað er eingin loyna, at vit eru væl nøgdir um hetta. Tað skuldi so ikki verið nakar ivi um, at hetta er ein styrkur av liðnum, og vónandi fer hetta eisini at síggjast aftur í úrslitunum, sigur formaðurin í leiðslubólkinum, Hans Petur Ellingsgaard.

Sum sagt, so verður Christian Høgni eftir ætlan í Føroyum nú leygardagin, og eru spæliloyvi og annað fingin upp á pláss rættstundis, er einki til hindurs fyri, at hann fer at vera millum leikararnar á vøllinum, tá NSÍ annan hvítusunnudag vitjar í Vági.

# Benny Johansen fingið nýtt starv

**Maðurin, sum ikki gjørdist landsliðsvenjari hjá Føroyum, skal nú røkja starvið, sum nýggi landsliðsvenjarin fer úr í summar**

VENJARI
*Jóannes Hansen*

Eins deyð er annars breyð, plagar at verða tikið til, og hetta er ikki minst satt, tá tað snýr seg um fótbólt.

Síðsta vikan er enn eitt gott dømi um hetta. Mánadagin varð tað kunngjørt, at Henrik Larsen skal vera venjari hjá føroyska landsliðnum. Hann er nú í starvi hjá Ølstykke, sum telist millum fremstu liðini í 2. deild í Danmark, og sum hevur góðar møguleikar at flyta upp í summar.

Hósdagin varð so kunngjørt, at Benny Johansen verður nýggjur venjari hjá Ølstykke. Hann skal taka við 1. juli ella dagin eftir, at Henrik Larsen er farin úr starvinum í Ølstykke.

Fótbóltshugaðir føroyingar og ivaleyst fleiri enn teir komast við navnið Benny Johansen. Tað var við hann, at FSF næstan hevði skrivað sáttmála í vár. Men so var ov lítið í pengapunginum. FSF gjørdi av ikki at skriva undir. Farið varð at leita eftir nýggjum venjara, og eftir at onkur hevði sagt nei takk, endaði tað í hesi vikuni við, at Henrik Larsen skrivaði undir.

At FSF ikki hevði ráð til samstarv við Benny Johansen, men hevur ráð til samstarv við Henrik Larsen kann skiljast upp á fleiri mátar. Tann mest upplagdi er, at Henrik Larsen bara er í parttíðar starvi hjá FSF, meðan uppleggið til Benny Johansen var, at hann skuldi vera í fulltíðarstarvi.

Henrik Larsen hevur ikki nógvar royndir sum venjari. Tað hevur Benny Johansen. Størstu avbjóðingina hevur hann havt í FCK. Har var hann venjari frá á sumri í 1992 og inntil 30. juni í 1994 og aftur frá 6. september í 1994 og inntil á sumri í 1995. Síðani hevur hann m. a. verið venjari í Silkeborg.

Nýggi venjarin hjá Ølstykke hevur eisini vant B1903, sum er partur av FCK. Benny Johansen spældi í síni tíð við B 1903. Fleiri av teimum, sum fyri einum fimtan árum síðani vóru stuðlar undir Ølstykke liðnum, sum fleiri ferðir flutti upp, høvdu framman undan verið í B1903.